## Seat ikki í Bella Center



Í sambandi við Copenhagen Motor Show í Bella Center í apríl, ynskti Seat verksmiðjan í Spanien, at teirra bilar verða sýndir fram nærhendis øðrum bilum frá VW-konsernini, men hetta læt seg ikki gera, tí verða ongir Seat á framsýningini

*Kelda: Semler Gruppen - Tíðindaskriv*

## Bíligari hybridbilar



Um man keypir ein umhvørvisvinarligan hybridbil sum t.d. Toyota Prius, kann man í Belgien trekkja 15 prosent av prísinum á bilinum av í skatti

*Kelda: bilpriser.dk*

## EPS standard í øllum VW



Volkswagen í Danmark hava innført ESP (Elektronisk Stabilitets Program) sum standard í øllum modellunum, sum kunnu leverast við hesi skipan. Tað eru bert Lupo og Shuttle, sum ikki fáast við ESP

*Kelda: bilpriser.dk*

VW Caddy og VW Marine:

# Opið hús við bilum og bátamotorum

**Í sambandi við at nýggi VW Caddy var komin á føroyska marknaðin, var opið hús á Bilasøluni v. Øssur Johannesen í Hoyvík leygardagin fyri páskir. Fyritøkan selur nú eisini Volkswagen bátamotorar**



*Starvsfólk hjá Bilasøluni tá opið hús var leygardagin 3. apríl, f.v. Øssur Johannesen, stjóri, Fróði Clementsen, sølumaður, Anton Jacobsen, kundamóttøka, og Jakku Guttesen, verkførari*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

BILASØLA

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nógv fólk vitjaðu á Bilasøluni v. Øssur Johannesen í Hoyvík leygardagin 3 apríl, har høvið var at royndarkoyra nýggja VW Caddy bæði sum Van og Kombi.

Enska orðið Caddie verður brúkt um teir, sum bera golfkøllurnar í golfspæli. Á lýsingunum í fjølmiðlunum og stóru lýsingarskeltunum í býnum eru gamlar myndir av monnum við torvleypi á baki, sum vísa á tær stóru broytingarnar, sum eru hendar, síðan bilurin avloysti leypin.

Í hesum sambandi fingu tey vitjandi smáar leypar, ið vóru gjørdir sum reklama fyri Caddy.

### Nú eisini VW bátamotorar

Sum nakað nýtt er Bilasølan nú farin at selja VW bátamotorar. Talan er um Volkswagen Marine motorarnar í ymiskum støddum heilt frá 40 til 150 hk.

Motorarnir fáast við girkassa ella drevi. Eisini er møguleiki fyri dupultari installatión. Motorarnir eru so gott sum teir somu, sum eru í VW-bilunum.



*Anton Jacobsen tekur sær av søluni av Volkswagen bátamotorunum. Hesin motorurin er ein 5 syl. við 120 hk*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Shetland Classic Motor Show:

# Føroyingar til Hetlands og hetlendingar til Føroya

**Saman við hetlendingum skipar áhugafelagið Føroya Ellisakfør fyri eini ferð við Norrønu til Hetlands at vitja framsýningina Shetland Classic Motor Show, sum verður í Lerwick í døgunum 5. og 6. juni 2004**

CLASSIC MOTORSHOW

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Shetland Classic Motor Show er eitt lutfalsliga stórt tiltak, har yvir hundrað fólk úr Onglandi og Skotlandi longu nú hava tekna seg til. Vitjandi koma eisini úr Íslandi og úr Føroyum.

Farið verður av Havnini við Norrønu fríggjamorgunin 4. juni kl. 8.30, og skipið leggur at í Lerwick kl. 21.00 um kvøldið.

Innskriving verður á hotelli, og akførini verða koyrd til Clickimin Centre, har fram-sýningin Shetland Classic Motor Show verður.

Shetland Classic Motor Show verður í tveir dagar, leygardagin 5. og sunnudagin 6. juni. Á framsýningini verða motorsúkklur, persónbilar og lastbilar av kendum gomlum merkjum. Akførini eru væl hildin og í upprunastandi.

### Hetlendingar til Føroya

Eisini verður skipað fyri fleiri áhugaverdum útferðum í Hetlandi. Farið verður heim aftur mikunáttina 9. juni kl. 2.00, og ferðalagið verður aftur á Havnini mikudagin kl. 15.00.

Á hesum túrinum koma hetlendingar við til Føroyar við teirra ellisakførum. Teir verða her til mánadagin 14. juni og skulu ferðast kring landið. Ein skrá er longu nú løgd fyri túrin í Føroyum.

Tey sum eru áhugaði í túrinum til Hetlands kunnu tekna seg á heimasíðuni hjá Føroya Ellisakførum: www.ellisakfar.com ella ringja til John William Old á telefon: 223243.



*Austin Cambridge á Shetland Classic Motor Show*



# Jaktar konufólk í málningum

LISTAFRAMSÝNING

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Oyndarfjørður, Sosialurin:** Hvør kundi hugsað sær, at undurfullar kvinnumyndir kundu skapast í einum kjallara í Oyndarfirði, langt burtur frá fólki í einum stórum húsum við einans einum íbúgva, einum manni.

Tó kvinnurnar verða skaptar tær verða teknaðar, litaðar, onkuntíð einsamallar, onkuntíð fleiri, og tær eru eitt gjøgnumgangandi evni í framsýningini hjá Jógvan Asbjørn Skaale, sum letir upp í Snarskivuni hósdagin.

– Eg havi arbeitt við konufólki alt mítt lív, og eg gerist neyvan klókari upp tær nú, sigur Jógvan Asbjørn Skaale, ið nærkast teimum seksti, slankur sum ein unglingi, men við eitt sindur hergaðum andliti. Hann situr í atelierinum í Oyndarfirði. Hetta er Fjallsgarður, ið hevur eina fortíð sum fjós, seyðahús, ferðamannaheim og nú atelier hjá listamanninum. Nú verða kvinnur evnaðar til í skjótum strokum, bróst og smalar mjadnar daga fram, grønt á svørtum og listamaðurin hevur sovornan hug at toyggja tær út. Hann man vera nakað veikur fyri høgum kvinnum. Nú datt eg sjálvur aftur í grøvina at fáa tað heila at líkjast, og tað er slett ikki meiningin.

– Eg keypti hetta húsið frá Fráhaldsrørsluni fyri nøkrum árum síðan. Í dag máli eg bara her. Her er øll útgerðin. Eg havi altíð droymt um at eiga eitt ordiligt atelier. Eitt rúm, har pláss er. Eg havi fyrr bara málað í kjallarum og har hevur tað verið soleiðis, at eg má goyma málningar burtur, skal eg mála. Her kann eg hava alt standandi frammi, og so kann eg ganga í millum málningarnar.

*Hevur Oyndarfjørður týdning fyri teg sum málara?*

– Ikki sum so, eg siti ikki uttanfyri og máli. Jú eg fari út um at fáa mær fríska luft við einum kaffikoppi, og har standi eg so og njóti vakra útsýnið. Men mín dystur við málningarnar eru frammanfyri lørriti inni í atelierinum. Tað hevur heldur ikki so stóran týdning fyri meg, hvat ljós kemur inn í rúmið. Eru nøkur neonrør tendraði, so havi eg dagsljós á myrkari nátt um so skal vera, og hetta ger meg heilt óbundnan av degnum, sigur Jógvan Asbjørn Skaale.

Tað er rúmliga húsið og friðurin sum lokkar Jógvan Asbjørn tann 70 kilometra langa teinin úr Havn og norður til Oyndarfjarðar.



*Jógvan Asbjørn í atelierinum í Oyndarfirði*

*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Jógvan Asbjørn er havnamaður við ættarbondum norðuri á Trøllanesi. Men hann er fyrst og fremst havnarmaður, ein býarmynd á kondittarínum og í hitarúminum í svimjihylinum. Tó samanhangangdi málingadagar í Oyndarfirði seta ferð á málningarnar, ið eru myndir innan úr Jógvan Asbjørni niður á lørriti og út til okkum, og serliga til tey sum skulu at vitja á Snarskivuni næstu dagarnar.

Jógvan Asbjørn málar ikki akkurát sum tað sær út. Hann málar tað hann sær inni í sær sjálvum og tað eru litirnir og spælið millum litirnar sum tað avgerandi orðið at siga.

– Um eg skuldi avmyndað lutir akkurát sum teir síggja út, so var eg fotografur. Tað eri eg ikki. Eitt tað ringasta eg veit er at mála støð, sum fólk biðja meg um at mála. Eg máli bygdir, men so skal tað eisini verða fantasibygdir. Eg orki ikki at binda meg til eitt fast motiv, sigur Jógvan Asbjørn Skaale. Og tað er ikki tí Jógvan Asbjørn ikki dugir at fáa tað at líkjast. Har standa ungdómsmyndir frammi í atelerinum. Hetta eru fotografiskt beinraktar myndir og teknari er Jógvan Asbjørn tiltikin. Framsýningin er frá 15-26 apríl.

Tað er mánadagur í stilluviku, tað er kalt uttanfyri, Jógvan Asbjørn fylgir mær út. Niðanfyri er høgur bakki og her plagdu oyndfirðingar fyrr at loysa sær buksurnar og vit ótangar kundu finna upp á at tveita bøkkar niður yvir teir. Søti roykurin úr fjøruni er burtur í dag og ár eru løgst aftur at lívið. Hvør segði at málningar skulu líkjast, hvør sigur at lívið skal líkjast?





Fiskivinnuskúlin í Vestmanna

## Tímalærarar til Fiskivinnuskúlan

Søkt verður eftir tímalærarum at byrja á Fiskivinnuskúlanum 1. august 2004 í hesum lærugreinum:

*Almennar lærugreinir:*
- Alisfrøði B-stig *(5 t/v)*
- Enskt C-, B- og A-stig *(4 + 4 + 5 t/v)*
- Fyriskipan A-stig *(4 t/v)*
- Týskt C-stig *(4 t/v)*
- Støddfrøði C- og B-stig *(5 + 5 t/v)*

*Yrkislærugreinir (nýggjar):*
- Alilívfrøði A-stig *(5 t/v)*
- Alitøkni B-stig *(4 t/v)*
- Framleiðslulæra, (í fiskavirking) B-stig *(4 t/v)*
- Havbúnaður, (alibúskapur) B-stig *(4 t/v)*

Umsøkjarar skulu hava prógv frá lærdum háskúla e.l., sum gevur førleika at undirvísa í lærugreinunum. Aðrir umsøkjarar kunnu tó eisini søkja. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarar til yrkislærugreinir hava undirvísingar- og vinnuroyndir, og at umsøkjarar til almennar lærugreinir hava undirvísingarroyndir.

Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara.

Umsókn skal skrivast á serligt umsóknarblað, sum fæst á Fiskivinnuskúlanum ella frá Mentamálaráðnum. Meira fæst at vita við at venda sær til skúlastjóran á Fiskivinnuskúlanum.

Umsóknir við ljósprentum av próvskjølum o.ø. skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. apríl 2004.

FISKIVINNUSKÚLIN

Fiskivinnuskúlin
Postrúm 96
350 Vestmanna
Tlf. 424 573
fiskvest@fiskvest.fo

VASTI 457171